umhvørvisstovan

# V E G L E I Ð I N G
# Brenning á báli ella eldstaði

Vernd, 3. útgáva, dagfest 16. juni 2008

Henda vegleiðing fyri brenning á báli ella eldstaði er ætlað kommunum, feløgum og einstaklingum. Vegleiðingin er bert galdandi fyri virksemi, ið kommunur hava eftirlit við.

**Kommunan skal geva loyvi til størri bál**
Loyvi krevst til at brenna størri bál, so sum nýggjárs- og jóansøkubál[1]. Loyvi verða latin av kommununi, treytað av, at bál ikki er til ampa og vanda fyri grannalagið. Um brenning elvir til ampa, skal kommunustýrið geva boð um, at bálið skal sløkkjast. Um ivamál eru um ampar og vandar, skulu einstaklingar og feløg viðgera hetta við kommununa.

**Loyvi krevst ikki til at brenna smá bál**
Ikki er neyðugt við loyvi frá kommununi til smærri bál, tá endamálið er matgerð ella annar útihugni, t.d. skótabál. Eftiransni og treytir eru annars tær somu sum fyri størri bál.

**Bert óviðgjørt tilfar kann brennast**
Tað er, óansæð hvat slag av eldstaði talan er um, bert loyvt at brenna tilfar, sum ikki dálkar. Tað vil siga, at tað er bert loyvt at brenna óviðgjørdan við, papp og pappír. Í rammu 1 er eitt stutt yvirlit yvir, hvat kann brennast og dømi um, hvat ikki skal brennast.

**Ikki er loyvt at brenna burturkast**
Nýggjársbálið, jóansøkubálið og onnur bál mugu ikki nýtast til at sleppa sær av við burturkast. Burturkast skal ikki brennast, tí nógvur og eisini vandamikil roykur kann koma frá hesum. Tá ið burturkast av ymsum slag verður brent, kunnu eitrandi evni verða í roykinum.

**Upprudding**
Leivdir frá bálum skulu altíð takast upp, skjótast til ber. Fyriskipari av báli hevur ábyrgdina av, at ruddað verður skjótast gjørligt aftaná, at bálið er slóknað. Leivdir frá bálum skulu latast til kommunalu burturkastskipanina.

**Hvat kann brennast?**
- Óviðgjørdur, turrur viður. Til dømis træplattar, trækassar og greinar
- Reint papp, pappír, kol, torv og koks

**Hvat skal ikki brennast?**
- Litað lýsingarbløð og annað blankt pappír
- Bildekk, gummi og plast
- Viðgjørdur viður – dømi: trýstviðgjørdur, málaður og lakeraður viður
- Spønplátur og træ við plastlaminat
- Innbúgv - sofur, madrassur
- Spillolja og annað vandamikið burturkast

**Burturkast og leivdir frá báli**
- Burturkast skal latast til kommunalu burturkastskipanina
- Leivdir frá báli skulu takast upp, skjótast gjørligt, og skulu latast kommunalu burturkastskipanini

**Ampar av eldstaðum (peisum) og smáum ovnum**
Nógvur roykur, dálking og ringur luktur kann standast av at brenna í opnum eldstaði, ovnum og fýri heima. Vánalig brenning kann elva til sót og illa luktandi royk og sostatt verða til stóran ampa hjá grannum. Eldstaðir og ovnar skulu verða innrættaðir so, at sjálv brenningin er góð. Bert reinur, turrur viður, papp, pappír, kol, torv ella koks skal brennast í eldstaði og ovnum. Jú betri brenning, jú minni roykur og sót, og harvið minni ampar fyri grannar.
Verður borgari varugur við, at roykur ella sót stendur frá egnari brenning, skal borgarin royna at bøta um umstøðurnar at brenna ella steðga framhaldandi brenning.

---

[1] Kunngerð nr. 147 um burturkast frá 19. oktober 1995

**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo